


**Perfektum standi og hysteriskt viðlíkahildin, stendur sum nýggjur.**

3.2 V6 bensin við 220 hk · km. 52.000 · aut. gear · leðurkabinu
el-setur við hita og 3x memory við speglum
park tronic system · regn følari · klimaautomatic · xenon ljós
partikkul filtur · síðu og bak spegl við auto niðurblending
el-sóltak · fart pilot · innstilliligt ratt
Mercedes anlegg við CD, borð teldu og 10 hátalarum
Mercedes alu-felgur við nýggjum heilársdekkum.







**Nýprísur 1,2 millión**
**Verður seldur um nøktandi boð fæst.**
***(bert seriøs boð ynskjast)***

**tlf. 582319**

FAROE SEAFOOD

## VASKIFÓLK

Søkt verður eftir vaskifólkum til virkið hjá Faroe Seafood í Havn, at byrja beinanveg.

Arbeiðið umfatar vask av framleiðsluhølum, útgerð, skrivstovum og fólkarúmum.

Upplæring verður givin.

Fyrimunir hava umsøkjarar sum hava royndir við vask av framleiðsluhølum og útgerð.

Arbeiðstíðin er á kvøldi, uml. 30 tímar um vikuna.

Løn sambært avtalu.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Rakul á telefon 594010.

**P/F Faroe Seafood Tórshavn**
Vestara Bryggja · FO-100 Tórshavn · Tlf. 355555 · Telefax 312631

FØROYA LANDSSTÝRI

Skipaeftirlitið
FAROESE MARITIME AUTHORITY
*MINISTRY OF FISHERY AND MARITIME AFFAIRS*

# Skrivstovufulltrúi

**Søkt verður eftir skrivstovufulltrúa til Skipaeftirlitið. Skipaeftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.**

**Starvið inniber í høvuðsheitum hesar upppgávur:**
- Málsviðgerð smb. lóggávu, ið knýtir seg at manningarviðurskiftum, undir hesum:
  - málsviðgerð av vinnubrøvum, herundir eisini málsviðgerð av vinnubrøvum hjá útlendskum sjómonnum, sum sigla við føroyskum skipum
  - at fyrireika manningarskjøl til fiskiskip, farmaskip og ferðamannaskip
  - at hava umsjón við mynstringum og viðurskiftum, sum knýta seg at mynstring
  - luttaka í fyrireikingararbeiðið til lógarsmíð
  - samskifti við vinnuna og aðrar myndugleikar.

**FØRLEIKAKRØV:**
Til starvið krevst viðkomandi skrivstovuútbúgving ella onnur viðkomandi útbúgving
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- telduførleiki á brúkarastøði
- at arbeiða við verkætlanum
- góð samstarvsevni

Umsøkjarar sum kenna mannagongdirnar í sambandi við útgávu av vinnubrøvum og telduskipanina hjá Skipaeftirlitinum, ið nýtt verður til endamálið, hava fyrimun.

**SETANARTREYTIR:**
Starvið verður lønt í lønarflokki 4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starsvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**UMSÓKNIR:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 3. oktober 2006, kl. 14.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Skipaeftirlitið**
**Postmoga 26, 370 Miðvágur**

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 355600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.

Postboks 26 · FO 370 Miðvágur · Faroe Islands · Tel.: 355600 · Fax: 355601 E-mail: fma@fma.fo

Sosialurin
Sosialurin
i